# Brek í brennidepli

*Týsdagin kom út nýggj bók, ið tekur upp eym evni, nevniliga, hvussu tað er at liva við breki og tískil vera í brennideplinum*

DAGFINN OLSEN

Á samkomu í MBF-húsinum týsdagin, løgdu Nicolina Dahl og Karen Heinesen fram nýggju bókina Brek í brennidepli, sum tær hava týtt úr svenskum og lagað til føroysk viðurskifti.

Tað er rár hending, fyri ikki at siga ongantíð, at bók kemur út, ið sigur frá, hvussu tað er at liva við breki. Men Brek í brennidepli lýsir hetta við innliving. Høvundurin Berit Lagerheim er lækni og barnasálarlækni. Eisini hevur hon útbúgving innan meira nútímans terapeutisk rák.

Í bókini sigur hon, at ein við breki kemur í brennidepil og hon lýsir henda brennidepil, so at bæði foreldur og starvsfólk fáa orku til samstarv.

Bólkin vendir sær í stóran mun til einstaklingin við breki, familjuna, og starvsfólkini, sum við sínum arbeiði hava ávirkan á, hvussu samspælið fer fram. Lesnaðurin kann vera hjálp til at fáa dirvi at taka upp til umrøðu torskild mál.

Nicolina Dahl beyð á samkomuni týsdagin vælkomin og greiddi frá bókini og arbeiðsgongdini Hon takkaði stuðlum. Hon greiddi eisini frá, at tær báðar, Nicolina og Karen, gjørdu av at geva bókina út á egnum forlag, nevnt Varpið, tí tær vildu sjálvar ráða yvir verkætlanini og so er hetta eisini serstøk bók, og óvist er, um annað forlag er, ið vil geva slíkt út.

Týdningarmikið fyri tær báðar hevur verið, at bókin er skrivað við stórum kunnleika, men høvundurin hevur eisini hjartað við.

Á samkomuni leiktu Heri Kragesteen og Herluf Lützen eitt lag, sum teir sendu inn til kappingina Vælskapt Brek, ið var herfyri. Hetta var sameining av live framførslu og tónleiki á bandi. Teir mettu, at hóast lagið ikki vann ella gjørdist nummar 2 ella 3 í kappingini, so var tað tó so frægt, at tað kundi hoyrast av øðrum. Og hesum høvdu teir sanniliga rætt í.

Kári Sverrisson leikti síðani 3 løg. Tvey teirra vóru løg, ið eru sett til yrkingar úr Kina, ið eru yrktar í tangtíðini, ið var umleið ár 800. Hesar eru týddar til føroyskt og riggaðu sera væl í útsetingunum hjá Kára. Hann leikti eisini eitt lag, ið hann hevur sett til orð heftir Hans Jacob Kollslíð.

Bókin Brek í brennidepli er 218 síður og kostar 230 krónur í bókabúðunum.




*Karen Heinesen og Nicolina Dahl geva út bókina Brek í brennidepli*





*Kári Sverrisson og Heri Kragesteen og Herluf Lützen stóðu fyri hugtakandi framførslum, tá Brek í brennidepli varð løgd fram týsdagin*
***Myndir: Dagfinn Olsen***

# Søgufrøði endurútgivin

*Skalt tú skilja søguligar keldur ella meta um søguligar spurningar, eisini nútíðar samfelagsspurningar, noyðist tú at hava amboð*

Í eina tíð hevur bókin Søgufrøði. Kelduviðgerð og háttaløg verið útseld, men nú hevur Føroya Skúlabókagrunnur givið bókina út aftur í broyttum líki. Tað eru teir báðir Kári Jespersen og Jens Pauli A. Nolsøe, lærarar í søgu og samfelagsfrøði í studentaskúlanum í Hoydølum, sum hava skrivað Søgufrøði. Kelduviðgerð og háttaløg.

Søgufrøði. Kelduviðgerð og háttaløg er ein metodubók til miðnámsskúlarnar, har ið flestu ástøðiligu amboðini eru savnað og umrødd, og hon lýkur tær treytir, sum kunngerðin í søgu setur. Bókin er ætlað at vera eitt amboð, ið kann hjálp næmingunum til sjálvstøðugt og kritiskt at skilja og viðgera keldur og útleggingar. Hon er ein søguhandbók og skal nýtast í øllum arbeiði við kelduástøði í søguundirvísingini.

Sum sagt er bókin í fyrsta lagi ætlað undirvísingini í miðnámsskúlunum, men hon kann eisini nýtast í øðrum hægri lærustovnum og av lærarum í fólkaskúlanum. Hjá almenninginum, sum ynskir sær nøkur amboð at skilja og meta um søguligar spurningar eins væl og nútíðar samfelagsspurningar, er hon hent. Metoda er týdningarmikil, tí hon er tað amboðið, sum fólk nýta at velja og vraka við, tá ið tey viðgera dagsins samfelagsmál. Aftast í bókini er leitorðalisti.

Óli Petersen hevur við sínum tekningum og myndlýsingum gjørt tekstin lættari at skilja. Ingi Joensen og Jan Jacobsen hava gjørt uppsetingog kápu og eisini havt ta grafisku viðgerðina. Hestprest hevur gjørt umbrótingina og havt prentumsitingina.

Tá bókin kom út í 1997, skrivaðu bløðini m.a.:

Søgufrøði. Kelduviðgerð og háttaløg er eitt gott dømi um, at tað ber til at evna eina lærubók á føroyskum, sum bæði fakliga og í góðsku annars ikki stendur aftan fyri aðrar útlendskar bøkur á sama stigi. (Fjølnir nr. 2 1998).

Við bókini eru næmingar á miðnámsskúlunum betur útgjørdir. Teir standa seg betur við at læra hugtøkini á egnum máli. (Dimmalætting 20. august 1997).

Onnur og broytta útgáva av Søgufrøði. Kelduviðgerð og háttaløg er 140 síður, í litum, og hon fæst í bókabúðunum fyri 140,- kr.




*Ein av myndunum í bókini Søgufrøði. Nú er onnur broytta útgáva komin út*



# Kvikk breyt gearið

*Beint eftir midnátt týskvøldið kom Gormur á Klaksvík við línuskipinum Kvikk, sum hevði fingið maskinbrek í ein útsynning úr Mykinesi*

SVEINUR TRÓNDARSON

Seint týskvøldið kom Gormur á Klaksvík við línuskipinum Kvikk, sum fekk maskinbrek týsdagin.

Tað var, meðan teir vóru í holt við at draga línuna, í ein útsynning úr Mykinesi, at gearið brotnaði. Skiparin legði stilt alt fyri eitt, og sendi boð eftir skipinum hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni.

Línuna mátti skipið lata standa til ein annan klaksvíksbát, Pison, at taka upp.

Reiðarin á Kvikk, Hans Oluf Johannessen sigur, at tað eftir øllum at døma er ein splitta, sum er dottin úr, og sum hevur gjørt, at ein stong hevur gjørt um seg.

- Men av tí, at vit hava steðgað motorinum beinanvegin, er skaðin ikki so umfatandi. Heilt hvussu umfatandi veit eg ikki, sigur Hans Olaf.

Tí veit hann í fyrsta umfari ikki nær Kvikk fer aftur til fiskiskap, men í sama viðfangi leggur hann afturat, at teir frammanundan høvdu ætlað, at skipið skuldi á sleipistøð í næstu viku, so tað er ikki óhugsandi, at alt nú verður gjørt um eina leið.

- Tí rokni eg ikki við, at vit fara út aftur áðrenn Norðoyastevnu, sigur hann og leggur smílandi afturat, at nógvir av manningini umborð á Kvikki eru so ungir. — Teir vilja fegnir hava Norðoyastevnuna við.

Annars sigur Hans Oluf, at fiskiskapurin við Føroyar er vánaligur í løtuni. Tá skaðin hendi, hevði Kvikk umleið 20 túsund pund inni, og tað er lítið.

- Mai mánaði er ofta øgiliga vánaligur, so nú mugu vit bara vóna, at tað verður frægari í næsta mánað, sigur Hans Oluf.




*Gjáranáttina kom vaktarskipið Gormur á Klaksvík við línuskipinum, Kvikk, sum hevði fingið maskinskaða*

Kvikk hevur eisini íslandsloyvið, men hóast tað kanska hevur verið frægari fiskiskapur har yviri, so verður tað ikki farið til Íslands í fyrsta umfari.

Kvikk er 13 ára gamal og tí eitt av teimum nýggjaru skipunum í flotanum. Fyri tey, sum hava eitt sindur av áhuga fyri skipum, kunnu vit siga, at tað er gamli Saturn III, sum hevur fingið navnið Kvikk eftir at hann er seldur til Klaksvíkar

# Kristindómur og politikkur í 20. øld.

Almennur fyrilestur verður á Fiskirannsóknarstovuni týskvøldið 30. mai 2000 kl. 18. Jens Holger Schjørring, professari í kirkjusøgu, heldur fyrilestur, ið hann kallar: *Kristindómur og politikkur í 20. øld.*

Jens Holger Schjørring starvast sum professari í kirkjusøgu við Teologiska Fakultetið á Aarhus Universitet. Hann hevur m.a. skrivað ritgerð á týskum um sambandið millum danska og týska guðfrøði í Hitlertíðini og "Ökumenische Perspektiven des deutschen Kirchenkampfes"; um lutherdómin í 20. øld hevur hann skrivað "From Federation to Communion. The History of the Lutheran World Federation 1947-1997" og um Grundtvig m. a. hesar bøkur "Grundtvig og påsken" og "Grundtvigs billedsprog og den kirkelige anskuelse".

20. øld var fram um alt merkt av teimum báðum heimsbardøgunum. Hvussu hava heimsbardagarnir ávirkað sambandið millum tær kristnu kirkjurnar? Men øldin var eisini merkt av ósemju millum kirkjurnar og einavalds ideologirnar, serliga nazismuna og kommunismuna. Hendan ósemjan fekk víttgangandi avleiðingar fyri kirkjurnar. Haraftrat var øldin merkt av tí økumenisku rørsluni.

Í fyrilestrinum verður í stuttum hugt at høvuðsrákinum í royndunum at skapa sátt og semju millum kristnu kirkjusamfeløgini.

# Skattareglurnar munandi lagaligari í grannalondunum

Havbúnaðarfelagið hevur fleiri ferðir víst á, at skattareglurnar eru munandi lagaligari í grannalondunum, t. d. í Noregi. Á hesum økið er kappingin tí ikki á jøvnum føti, skrivaði Vinnuhúsið herfyri í tíðindaskrivi.

Víst var til kanning, og varð mælt til, at »carry back« reglur koma inn í føroysku skattalógina, á sama hátt sum í Noregi, t.v.s. at skattur goldin eitt ár kann í tvey ár verða goldin felagnum aftur, um tað vísir seg, at felagið fær undirskot innan fyri hetta tíðarbil, og at tíðarbilið, har hall kann førast fram og dragast frá skattliga úrslitinum, verður longt upp í 10 ár.

Her er vert at viðmerkja, at Endurreisingarnevnd landsstýrisins í áliti sínum í 1994 vísti á hesi viðurskiftir. Skattalóg okkara tekur í hesum viðurskiftum støði í tí donsku, ið er tillagað donskum samfelagsviðurskiftum og ikki einum samfelag, sum tað føroyska. Bæði ali- og fiskivinnan eru tengdar at náttúruviðurskiftum og kunnu tí hava stórar og óvæntaðar broytingar frá ári til árs. Og hetta eigur skattalógin at leggja upp fyri.

## Ókeypis dekkanningar

Sum eitt afturvendandi tiltak síðani fyrst í 70'unum er Super Dekk nú aftur farið at skipa fyri ókeypis dekkeftirlitið, við orðunum latið okkum kannað dekkini, áðrenn løgreglan ger tað!

Sum flest allir bilførarar vita, er tað sera umráðandi at hava dekkini í lagi, tað verður mynsturdypd, lufttrýst og sporing, og júst í hesum døgum er løgreglan úti og ger grein 3 ella 77 kanningar, har eitt nú dekkini verða gjølla kannað.

Dekk-kanningin hjá Super Dekk byrjaði í viku 20 og endar leygardagin í viku 21, tann 27. mai, opið er allar arbeiðsdagar sum vanligt, frá kl. 08-17.

Leygardagin 27. verður latið upp kl. 10 við eitt sindur øðrvísi tiltaki, við at tað verður skipað fyri kappingum av ymsum slag, og frá kl. 12 hava vit pylsur og okkurt leskandi til øll, sum koma at vitja.

Kappast verður um at fáa tað stóra gummigedadekki (uml. 300 kg.) sum var við í »Føroya sterkasti maður« upp at standa, eydnast tað, er ein við í lutakastinum um 4 Goodyear persónbila-dekk.

Børn 8-12 ár kappast um at fáa eitt lastbilahjól (uml. 90 kg.) upp at standa, eydnast tað, eru tey við í lutakastinum um ein Goodyear mini-trailara.

Tey minstu børnini sleppa eisini at kappast, og verður tað við at grulva og klúgva um ymsar dekkforingar, klára tey tað, eru tey við ú lutakastinum um ein Goodyear leikutoysbil.

**HD - 1. PARTUR Í FØROYUM**

**Treytað av nóg stórari luttøku verður í heyst aftur farið undir HD 1. part.**

HD 1. partur er ein grundleggjandi ástøðilig innføring í lærugreinirnar vinnubúðskap, samfelagsbúðskap, hagfrøði, vinnulívsrætt og teld.

**Upptøkukrøv:**
Hægri handilsskúla-, Students-, HF- og HT-prógv ella hægri útbúgving. Eisini skal tann, sum ætlar sær at lesa HD 1. part, hava prógv í støddfrøði á B stigi.

Til ber eisini at lesa onkra einstaka lærugrein, sum tú kanska hevur brúk fyri í sambandi við arbeiðið.

Undirvíst verður mánakvøld og mikukvøld kl. 15.45-19.15.

Próvtøka verður í mai/juni 2002.

Áhugað fáa umsóknarblað og tilfar um HD 1. part við at ringja, telefaksa ella senda teldupost til skúlan **sg@hsh.fo** okkum dámar best um tygum nýta teldupostin.

Luttøkugjaldið er kr. 2.000,00 fyri hvørja lestrarhálvu ella 4.000,00 kr. um árið. Stakgreinalestur hevur onnur gjøld.

Eru tygum í iva um okkurt við HD 1. parti ber eisini til at ringja til skúlan á tel. 317177 mánadag-fríggjadag kl. 08.00-12.00 og 13.00-16.00.

**Umsóknarfreistin er til 15. juni.**

Sosialurin - 311820

**Føroya Handilsskúli**
Marknagilsvegur 77 • Postsmoga 177 • FO-110 Tórshavn
Tel. 317177 • Fax 313374 • Teldupost: sg@hsh.fo